# 387 skúlabørn uttan heilsusystur í hálvt ár

**Seinasta hálva árið hevur tað verið upp til foreldrini sjálvi á Skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík at varnast og fáa hjálp fyri møgulig brek hjá teirra børnum. Vantandi peningur er ein av orsøkunum til at ongin heilsufrøðingur er í starvi á skúlanum**

HEILSA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Ella Heinesen, formaður fyri skúlastýrið við Skúlan á Ziskatrøð, hevur ilt við at skilja, hvør sparing skal vera í at seta heilsuna hjá næmingunum á skúlanum uppá spæl*



*Millum annað vegna sparingar hava hvørki 1. floks næmingar ella tey eldru børnini í skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík seinsta hálva árið fingið tær heilsukanningar, tey hava krav uppá*

Í meir enn eitt hálvt ár hevur starvið sum heilsufrøðingur á skúlanum á Ziskatrøð staðið órøkt. Hetta merkir millum annað, at børnini í fyrsta flokki ikki hava fingið ta grundleggjandi 1. flokks heilsukanningina, ið eigur at verða gjørd í hesum aldursbólki. Kanningin er samstundis tann mest umfatandi av sínum slag, har møgulig brek kunnu avdúkast, so børnini kunu fáa serkøna hjálp í rættari tíð.

Sambært foreldrum at børnum í skúlanum, hevur hvørki skúli ella heilsumyndugleikar kunnað tey um støðuna. Av tilvild og sínum eintingum hava foreldur hvør í sínum lagi varnast støðuna, sum eftir teirra tykki er ábyrgdarleys. Men hóast tey saman við skúlastýrinum fleiri ferið hava vent sær til avvarandi mynduleika, er tað ikki eydnast at fáa eina frágreiðing um, hvør trupulleikin er ella nær ein loysn kann væntast.

## Slept upp á fjall

Anna Svanhilda Johannesen er foreldur at drongi í fyrsta flokki á skúlanum á Ziskatrøð. Í novembur í fjør tók hon stig til at skriva skúla- og heilsumynduleikunum bræv, har foreldrini millum annað gera vart við støðuna. Inn til tá høvdu foreldrini liva í góðari trúgv um, at skúlin nokk skjótt fór at kalla tey og børnini inn til 1. floks heilsukanningina. Orsøkin til at Anna Svanhilda tók hetta stigið var, at hon frá optikara júst hevði fingið at vita, at sonur hennara var 50% blindur.

– Eg fekk illgruna um, at okkurt var galið, eftir at eg og sonurin høvdu verið og hugt eftir sjónleikinum Ronju Ránsmannsdóttir. Hann hevði glett seg øgiliga nógv, og tí undraði tað meg, at hann onki segði um tað, sum fór fram á pallinum. Ikki fyrr enn hann einaferð spurdi, um vit kundu flyta okkum nærri, fekk eg illgruna um, at hann møguliga ikki sá, hvat gekk fyri seg, greiðir Anna Svanhilda frá, sum tískil fór til optikara í býnum við soninum alt fyri eitt. Har varð so staðfest, at drongurin bert hevur helvtina av vanligari sjón, og gongur hann tí við sterkum brillum nú.

– Soleiðis fann eg út av, at okkurt var galið, men tað loysir jú ikki trupulleikan við vantandi heilsufrøðinginum, sum átti at verið tann, sum avdúkaði og gjørdi meg varuga við brekið. Tað kann heldur ikki vera rætt, at hjálpin, tú fært, veldst um, hvussu árvakin foreldur hvør í sínum lagi eru, sigur Anna Svanhilda. Hon leggur afturat, at 1. floks heilsukanningin samstundis er tann einasta vitjanin, har foreldrini eru við, og tað er har, sambandið við heimið verður etablerað. Í so máta kenna foreldrini seg slept uppá fjall, tí tey ongan hava at venda sær til viðvíkjandi heilsustøðuni hjá teirra børnum. Ongin skúlalækni hevur nevniliga verið í kommununi í nógv ár, og støðan við kommunulæknum hevur illa nokk nøkta tann læknatørv, sum longu er frammanundan.

## Óskiljandi sparing

Í lesarabrævið í blaðnum í dag vísir formaðurin fyri skúlastýrið á skúlanum á Ziskatrøð, Ella Heinesen, á, at hon beint eftir nýggjár fekk at vita frá leiðaranum á heilsufrøðiskipanini, Bjartu Vilhelm, at søkt fór at verða eftir nýggjum heilsufrøðingi til skúlan fyrst í hesum árinum. Enn hevur tó ongin lýsing verið at sæð í bløðunum, og sum Ella skilur, er ein av trupulleikunum, at tað finnast so fáir útbúnir heilsufrøðingar. Ella undrast á, hví ein sjúkrarøktarfrøðingur tí ikki kann setast í starvið í staðin, tá ein sjúkrarøktarfrøðingur røkti starvið væl og virðiliga síðsta skúlaár. Um ikki annað mátti hetta verið ein betri loysn enn onga slíka tænastu at hava.

Sum Ella skilur eru sparingar eisini partur av orsøkini til støðuna. Hon heldur tað tó vera trupult at skilja, hvør sparing skal verða í at lata vera við at kanna heilsuna hjá skúlanæmingum, tá tann fyribyrgjandi týdningurin av slíkum kanningum átti at verið ein nógv størri sparing í sær sjálvum.

Bjarta Vilhelm ásannar, at støðan er sera óhep-pin, men sigur at heilsufrøðingaskipanin fer at søkja eftir heilsufrøðingi til skúlan á Ziskatrøð ein av komandi døgunum. Hon kann ikki gera viðmerkingar til, hví hendan støðan er íkomin, men vísir til Mary í Garði, sum er leiðari fyri Heimarøktina og ser-forsorgina, ið varðar av økinum.

Bjarta leggur afturat, at skúlin á Ziskatrøð hevur fingið tilboð um hjálp í serligum førum, men ásannar, at sum heild fáa næmingar á skúlanum í løtuni ikki ta heilsutænastu, tey hava krav uppá.

# Vantandi fígging partur av trupulleikanum

**Ov trongur lønarkarmur fyri økið er partur av trupulleikanum við vantandi heilsufrøðingi á skúlanum á Ziskatrøð, ásannar Mary í Garði, stjóri fyri Heimarøktina og Serforsorgina**

HEILSA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Mary í Garði, stjóri fyri Heimarøktina og Serforsorgina, sum varðar av heilsufrøðingaskipanini ásannar, at vantandi fíggjng er partur av trupulleikanum við at nøkta tørvin á heilsufrøðingar til skúlar í Føroyum. Ein onnur orsøk er, at skipanin virkar á ein hátt, har tað illa letur seg gera at leggja øki inn undir hvørt annað, og á tann hátt fáa tørvin nøktaðan.

## Afturvendandi trupulleiki

Heimarøktin og Serfor-sorgin hevur fleiri ferðir gjørt Almanna og Heilsumálaráðið varugt við trongu fíggjarligu karmarnar hjá heilsufrøðiskipanini, men uttan úrslit.

– Spurningurin er eisini, um vit hava dugað nóg væl at grundgivið fyri støðuni, tí øll skipanin sum hon er, er afturúrsilgd tá tað ræður um at fáa eina neyva mynd av støðuni, ásannar Mary í Garði.

Spurd um ikki tað, at 387 næmingar í Klaksvík í løtuni standa uttan heilsufrøðing ikki er ein nóg góð grundgeving sigur Mary, at tað átti tað sjálvandi at verið.

– Tað er avgjørt ikki í lagi, at ongin heilsufrøðingur er á skúlanum í løtuni, men vit arbeiða við málinum og søkja í næstun eftir einum heilsufrøðingi, sigur Mary. Hon harmast um at foreldur og skúli í Klaksvík ikki vórðu kunnaði um støðuna frá byrjan, og viðgongur, at um so er, hevur samskiftið svikið á onkran hátt.

Mary vísir á, at trupulleikin við vantandi heilsufrøðigum javnan stingur seg upp á skúlum kring landið. Í løtuni eru tey í ferð við at endusskoða alla skipanina fyri at fáa greiðu á, um ein umskipan kundi loyst part av trupulleikanum.

– At so fáir útbúnir heilsufrøðingar eru, er eisini ein trupulleiki, men í hesum føri hevði tað verið frægari enn onki at fingið ein sjúkrarøktarfrøðing at taka hetta vikariatið á Skúlanum á Ziskatrøði í Klaksvík, heldur Mary í Garði



*Vantandi fígging er ein av orsøkunum til tørvin á heilsufrøðingum á skúlum, men øll skipanin, sum hon er, er afturúrsilgd, sigur Mary í Garði, stjóri fyri Heimarøktina og Serforsorgina*